


*Nr. 17* **19. august 2018** *78. árg.*

# Gud vil føra sak tína

*Sætt tað tú hevur, tí sorg og móð títt eyga skoðar, til tess at líta tað upp í tínar hendur; neyðstaddur troystar á teg, faðirleysum manni tú hjálpari varðst!*
*Sálmur 10,14.*

Ævintýrið um Øskufíu hevur hugtikið ættarlið eftir ættarlið. Okkum dámar søguna um gentuna, sum misti mammuna, og sum varð pínd og plágað av stjúkmóðrini og eldru systrunum, men sum at enda vinnur prinsin.

Um vit uppliva tað soleiðis, er tað tí, at vit hava samkenslu við veikasta partinum, sum bæði verður órættvíst viðfarin, og hennara rætti arvur verður tikin frá henni.

Av og á kann tað tykjast, at Guds eygu ikki eru opin, tá ið barn hansara líður órætt. Satt at siga kann tað stundum tykjast betri at liva fyri sær sjálvum og ikki fyri Gudi.

Men Gud er rættvísur. Hann hevur als ikki latið eygu síni aftur fyri tí, sum hendir. Tað sæst týðiliga og greitt út frá skriftorðinum her omanfyri.

Gud bæði sær og vil taka sær av tí veika.

Samstundis er hann Faðir hjá einum og hvørjum Guds barni, og ein dag fara øll, sum trúgva, at fáa lut í dýrd hansara.

*Lítla Guds barn á foldum her,*
*halt tú teg at tínum Faðir nær,*
*spyr um hans makt og kærleik við,*
*lít tú á hann og hvíl í frið.*
*Gud havi lov.*

*Føði og klæði, faðir vár,*
*gevur í morgin tær sum í gjár;*
*og tá tú svevur deyðans blund,*
*arvar tú dýrd hans somu stund.*
*Gud havi lov.*

# Váðaverkið

*Í trúgv doyðu allir hesir, uttan at teir høvdu ognast fyrijáttanirnar; men teir sóu tær og heilsaðu teimum langt burturfrá og ásannaðu, at teir vóru fremmandir og útlendingar á jørðini. Hebr. 11,13–19.*

Tann, sum onki vágar, hann onki vinnur! Fevna hesi gomlu orðini um verðsligar lutir, so fevna tey eisini um hin andaliga heimin. Trúgvin er eitt váðaverk, og tann, sum ikki vágar at trúgva, fer heldur ikki at vinna. Tað var trúarinnar váðaverk, tá ið Símun Pætur – eftir eina heila nátt at hava stríðst á Genesaretvatni – aftur legði út á dýpið á alljósum degi og setti gørnini útaftur. Hetta var váðaspæl, men varð gjørt í lýdni eftir orðum Meistarans. Úrslitið var, at bátarnir komu søkkladnir aftur at landi.

Tað var eisini eitt váðaverk, tá ið Ábraham fór frá sínum fólki og landi, hóast hann ikki visti, hvagar hann skuldi fara. Men hann vágaði tað í lýdni og trúgv, og hann kom til hitt fyrijáttaða landið.

Tann, sum ikki torir at vága ferðina út á 70.000 favna dýpi, hann upplivir ongantíð lívsins ríkidømi og fyllu. Tað er sum skaldið, Hostrup, hevur skrivað: „At líta á lívið – verður tað sannroynt. At elska lívið – verður tað greinað. At vága lívið – verður tað vart. At geva lívið – verður tað varðveitt.“

Torir tú at vága at trúgva á Gud? Ella torir tú ikki at vága at trúgva á Gud?

*t.* týddi.

---

Kennir tú ein tómleika innan í tær? Tað er tí, at tær tørvar Jesus, og tað er hann, tú hevur saknað og longst eftir. Bjóða honum inn í hjarta títt. Tað er, sum ljósið verður tendrað í einum myrkum rúmi. Tú fært ein vin at styðja teg til, tá ið lívið gerst torført.

*e.c.* ums.

# Krukkan, sum lak

Ein gomul kinesisk kona hevði tvær stórar krukkur, sum hingu í hvørjum enda á einari stong. Hesa stong bar hon tvørtur um herðarnar, tá ið hon fór eftir vatni. Onnur krukkan hevði fingið eina rivu, meðan hin var lýtaleys, vøkur og heil og kom altíð aftur við fullari vatnkrukku, meðan krukkan, ið lak, bara útvegaði eina hálva krukku við vatni.

Hetta endurtók seg dag um dag í tvey ár, at konan kom til hús við hálvaaðrari krukku við vatni. Sjálvandi var hin lýtaleysa krukkan erpin av sínum úrsliti; men krukkan, sum lak, skammaðist og var ólukkulig, av tí at hon bara hevði eina hálva portión eftir, tá ið tey komu til hús.

Ein dagin klagaði hon sína neyð niðri við ánna. Hon segði tí gomlu konuni, at hon var so hørm um, at hon vegna rivuna bara hevði helvtina av vatninum eftir, tá ið tær komu til hús.

Men gamla konan smíltist bara og spurdi krukkuna við sprunguni, um hon hevði givið sær far um allar blómurnar á hennara vegjaðara heim, meðan tað á hinum vegjaðaranum ikki vóru nakrar blómur.

Hon greiddi frá, at hon í tvey ár hevði vitað um hesa rivuna og hevði sáað blómufræ á hennara vegjaðara, tí lekin úr krukkuni vætti fræini á veg heim frá ánni. Tí hevði hon nú í tvey ár verið før fyri at henta tær yndisligastu blómurnar. „Tí er heim mítt vakurt pyntað við blómum," segði konan.

Um hin ótætta krukkan ikki hevði havt eitt brek, so hevði hetta als ikki kunnað latið seg gjørt. Øll hava síni serligu brek og skeivleikar. Vit hava øll okkara rivur og sprungur.

Tað er millum annað tær, sum gera okkum til tey, vit eru. Døm ikki bróður ella systur tína fyri eina sprungu ella tvær. Tað er kanska júst gjøgnum tær sprekkurnar, at fræini fáa vætu og vælangandi blómur spretta.

**Guds útveljing:** „Tí at, brøður, lítið at kallan tykkara, at tit eru ikki mangir vísir eftir holdinum, ikki mangir máttugir, ikki mangir hábornir; men tað, sum heimurin heldur dárskap, valdi Gud sær út fyri at gera hinar vísu til skammar; og tað, sum heimurin heldur veikt, valdi Gud sær út fyri at gera hinar sterku til skammar." (1. Kor. 1,26–27).

**Hann skilir:** ”Tí tit hava ikki ein høvuðsprest, sum ikki kann hava várkunn við veikleikum okkara, men ein, sum er freistaður á allan hátt líka við okkum, tó uttan synd. Latum okkum tí við frímóði ganga fram at hásæti náðinnar, fyri at vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálpar í tímiligari tíð!” (Hebr. 4,15–16).

*Effie Campbell* umsetti.

# Samkensla hansara fylgir okkum

Av tí at hann er heilagur, kann Gud ikki torga synd, men hann elskar syndaran, og ígjøgnum sáttargerð Jesu hevur hann gjørt tað, sum neyðugt var fyri at fyrigeva synd. „Men Gud sýnir kærleika sín til okkara av tí, at Kristus doyði fyri okkum, meðan vit enn vóru syndarar.“ (Róm. 5,8).

Samkenslan í eygum Guds fylgir okkum, meðan vit støplandi stríða okkum fram ígjøgnum søguna undir byrðuni av okkara egna vesaldómi. Golgata skuldi prógva fyri sjálvt tí ivingarsamasta, at Gud ikki er blindur fyri plágu okkara, men at hann er villigur at líða saman við okkum. Guds altfevnandi kærleiki til mannaættina kemur best til sjóndar á krossinum, har samkensla hansara fær skap í Jesusi Kristi.

Jeremia profetur skrivaði: „Úr fjarlegd birtist Harrin honum: Við ævigum kærleika havi eg elskað teg, tí vart tú leiddur av miskunn míni.“ (Jer.31,3). Paulus ápostul talar um, at Gud, sum er ríkur í miskunn, hevur av sínum mikla kærleika, sum hann elskaði okkum við, gjørt okkum livandi saman við Kristi.“ (Ef. 2,4–5). Tað var Guds kærleiki, sum negldi Jesus á krossin.

---

Kærleikin er ókeypis, men hann má býtast út. Hann veksur, tá ið vit luta hann við onnur. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




*Nr. 18* *2. september 2018* *78. árg.*

# Vár trúgv várt fasta álit er

Tá ið Georg Friedrich Händel lá til tað seinasta og merkti, at endin var nær, bað hann trúfasta tænara sín, Jóhan, lesa 91.Sálmin hjá Dávidi. Tá ið upplesturin var av, segði hann: „Hatta var vakurt. Les meira. Les 15. kapitul í Fyrra Korintbrævi fyri mær !“

Meðan Jóhan las, breyt hin sjúki hann ofta av við orðunum: „Steðga – les hatta umaftur!“

Løtu seinni vildi hann sleppa at hoyra yndissálmin hjá mammu síni: „Vár trúgv várt fasta álit er –.“

Hann las orðini saman við Jóhan og segði:

„Tað er vælsignað at vera so vissur í síni trúgv. Evangeliska kirkjan er í sannleika rík við sínum prædikum um ta fríu náðina í Kristi sum syndarans vón. Skuldu vit litið á gerningar okkara, hvat hevði so verið av okkum? Tað, sum finst av góðum í okkum – er tað ikki alt samalt gáva frá Gudi? Men ongin kann seta fram krøv av tí, sum ein hevur fingið. Og hava vit so gjørt tað, sum vit skulu og kunnu gera? Gud, ver mær náðigur, hvussu nógv ið enn herjar á meg við ákærum! Og var orðið um náði ikki har, – so var ongin vón! Tá ið eg var ungur, royndu fólk niðri í Italia at fáa meg at gerast katolikkur. Harri, Gud mín – eg takki tær, at eg ikki rann meg í ta felluna. So hevði eg nú ligið her uttan vón. Sanniliga – Luther, doktari, hevur funnið rætta evangeliið, at sælan verður givin tí av náði, sum trýr á Kristus Jesus. Í tí náðini hangi eg við báðum mínum hondum.“

Händel fekk ynski sítt uppfylt, at hann skuldi doyggja deyðsdagin hjá Harra sínum og Meistara. Langa fríggjadag doyði hann stillisliga við hesum orðum:

***„Harri Jesus – tak ímóti anda mínum! Lat meg sleppa at doyggja saman við tær og rísa upp saman við tær!“***

# Eg havi tykkum í hjarta mínum

*Av tí at eg havi tykkum í hjarta mínum, bæði í leinkjum mínum, og tá ið eg verji og staðfesti gleðiboðskapin, við tað at tit allir eru samfelagar við mær um náðina. Tí at Gud er vitni mítt, hvussu mær leingist eftir tykkum øllum við Krists inniliga hjartalagi.*
*Fil. 1,7–8.*

Tað vóru hjartalig viðurskifti millum Paulus, ápostul, og kirkjuliðið í Filippi. Hann nýtir hesa vøkru orðingina, at hann hevur tey í hjarta sínum bæði í leinkjum sínum, og tá ið hann verjir og staðfestir gleðiboðskapin. Og hetta sigur okkum, at hvat ið Paulus so tókst við og sum legði hald á hansara hugsan, so hevði hann í hjarta sínum eitt ríkt og heitt samband við góðu vinir sínar í Filippi.

Hetta var týdningarmikið hjá honum, bæði tá ið hann var hjá teimum, og tá ið hann var burtur frá teimum. ***Eg havi tykkum í hjarta mínum!*** Er tað so undarligt, at Paulus nýtir so sterk orð um sambandið teirra millum, at hann takkar Gudi fyri tey, so ofta hann hugsar um tey, og at hann altíð í hvørjari bøn biður fyri teimum øllum við gleði.

Paulus takkar fyri tann hátt, sum tey tóku ímóti gleðiboðskapinum og tóku lut í honum frá fyrsta degi og til nú. Og so troystar hann seg í tí gleðiligu fullvissu, at tann, sum hevur byrjað góðan gerning í teimum, vil fullføra hann alt til Jesu Krists dag.

***Eg havi tykkum í hjarta mínum!*** Kunnu vit siga tað sama um okkara vinir?

*t.* týddi.

# Ert tú uppslitin?

Vanliga er Danmark at finna millum trý tey ovastu á listanum yvir tey lukkuligastu fólk. Kortini sigur ein OECD-frágreiðing, at danir eru heimsins mest sálarliga uppslitin fólk. Danmark er tað landið í heiminum, har flest fólk mugu fara úr arbeiðsmarknaðinum av sálarligum sjúkum.

Okkara arbeiðsráðharri, Inger Støjberg, viðgongur, at „her hava vit eitt stórt arbeiði at gera." Stjórin á granskingarstovninum fyri arbeiðsumstøðum sigur: „Hetta hava vit eftir øllum at døma ikki dugað nóg væl at handfarið." Uppskotini eru sjálvandi at senda tey útslitnu, sálarligu tyngdu fólkini til sálarlæknar og sálarfrøðingar – og møguliga geva teimum fyritíðareftirløn.

Eg hugsi um eina aðra loysn. Eg eri ikki vísur í, at hesi klóku høvdini við øllum sínum titlum vilja lurta eftir hesum. Men um tú kennir teg uppslitnan, lurta so eftir einum góðum ráði úr Guds orði, sum í Fil. 4,6–7 sigur:

„Verið ikki stúrnir fyri nøkrum sum helst. Staðin fyri skulu tit biðja til Guds um allar lutir. Tosa við Hann um alt, sum tit hava brúk fyri, og gloymið ikki at takka Honum. Tá skulu tit sanna, at Guds friður, sum ber av øllum menniskjansligum viti, skal varðveita tykkara tankar og hjørtu í trúgv á og áliti til Kristus Jesus." (Nýggj ums.)

Er tað ikki júst hetta, teir mongu niðurslitnu danir hava brúk fyri? „Guds friður, sum ber av øllum menniskjansligum viti, og sum varðveitir tankar og hjørtu."

Tann friðin kunnu eingir sálarlæknar ella sálarfrøðingar bjóða tær, uttan so at hann/hon kennir Jesus Kristus. Friðin, sum ber av øllum viti og skili, kann eingin greiða tær frá og lýsa út í æsir – men tú kanst uppliva hann. Hann kemur sum ein frukt, tá ið tú gevur lív títt upp í hendurnar á Jesus Kristus. Eg vóni, at tú kennir Hann. Annars kanst tú koma at kenna Hann. Jesus hevur sagt ja við teg. Hann bíðar eftir, at tú skalt siga ja til Hansara. Friðurin fylgir við lívinum saman við Jesusi. Tí Hann er hin sanni Friðarhøvdingin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Forskriftin

Skúlagongdin var júst byrjað. Smágenturnar høvdu fingið handað nøkur kladduhefti frá læraranum. Ovast á fyrstu síðu á kladduheftinum hevði lærarin skrivað nakrar bókstavir, sum børnini so skuldu royna at skriva eftir sum frægast.

Ein lítil genta hugdi at bókstavunum og brast í grát. „Eg fari aldri at skriva so vakurt," segði hon. Hini børnini hugdu at tí, hon hevði roynt at skriva, og flentu í kíki, tí tílíkt klór høvdu tey ongantíð sæð áður. Lítla gentan gjørdist meira og meira mótleys og bangin. – Lærarin fer uttan iva at skelda meg út, tá ið hann sær hetta klórið, hugsaði hon við sær sjálvari.

So kom lærarin at hyggja. Hann legði hendurnar á herðar hennara, hugdi at stavunum og segði: „Tú roynir, góða – og tú skalt nokk læra tað fyrr ella seinni."

Tá tendraðist ein nýggj vón í lítlu gentuni. At hugsa sær, at lærarin trúði, at hon fór at læra at skriva. Hann hevði sagt, at hon fór at duga at skriva. Og hon royndi sum ongantíð áður.

Ja, tað er ikki altíð lætt her í lívinum at fáa bókstavirnar at líkjast forskriftini. Kann henda, at tá ið tú hyggur at Meistara okkara, so knípir við samanlíkningini.

Tað kann vera, at tú roynir, men heldur, at tú kemur ongan veg. Men tá kemur Jesus til tín og sigur: „Tú roynir, vinur mín, enn restar tær nakað í hjá tær at fáa bókstavirnar so fínar, sum teir kunnu verða, men tú roynir."

Mátti Meistarin sæð hetta hjá okkum øllum, at vit hava vilja at fylgja forskriftini. At vit royna at fáa bókstavirnar so vakrar sum gjørligt. Og mátti so ein dagur upprunnið fyri okkum, at vit ikki longur bert royndu, men ein dagur, tá ið Meistarin hevði lært okkum tað fullkomna.

*A. J.*

---

Kristniboðan er Guds hjartasøk, og hon er størsta skyldan, vit sum kristin hava. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74